Føroyingar við í Dublin

Mánamorgunin fór føroyska liðið, sum skal vera við á Special Olympics World Summer Games 2003, á flog úr Vágunum. Føroyar luttaka við 10 ítróttarfólkum í 4 ítróttargreinum. Men innan leikirnir verða settir leygardagin, verða føroysku luttakararnir gestir í norðurírska býnum, Carrickfergus, har tey eisini koma at venja komandi dagarnar

ÍTRÓTTUR
Rúna Sivertsen

Special Olympics Summarleikirnir 2003 eru størsta ítróttartiltak í hesum árinum við 7000 ítróttarfólkum, sum koma úr 160 londum til at kappast í 23 ymiskum ítróttargreinum.

Eini 3000 venjarar og hjálparar vera við, og 40.000 fólk hjálpa sjálvboðin til undir leikunum og ítróttarvitjanini í Írlandi.

Føroyar luttaka í frælsum ítrótti, borðtennis, boccia og svimjing, og luttakararnir eru: Meiken Olsen, Marjun Niklasdóttir, John Joensen, Tórur Hjalt Jacobsen, Unn Mortensen, Júst í Túni, Sidana Djurhuus, Elvin Weihe, Durita Strøm og Símun Petur Zachariasen.

Okkara ítróttarfólk, sum vóru endaliga úttikin stutt fyri páskir, hava síðan í heyst vant dúgliga og miðvíst til hesar kappingarnar.

Gestir í Carrickfergus

Í 4 dagar undan leikunum verða øll londini boðin at vera gestir í onkrum írskum býi. Føroyska liðið verður gestur hjá norðuríska býnum, Carrickfergus, sum eisini syrgir fyri, at ítróttaroki eru til taks, so okkara ítróttarfólk fáa vant hesar 4 dagarnar.

Vertsbýurin skipar fyri ymiskum. Hugt verður eitt nú inn á gólvið hjá borgarstjóranum, og vant verður í frálíka Leisure Centrinum. Eisini verður sight-seeing til gamla slottið og kvøldundirhald, sum Lions Club skipar fyri.

Mandela setir leikirnar

Setanin, sum verður 21.juni kl.18 í Croke Park í Dublin, fer at vara 3 1/2 tíma. Pláss er fyri 75.000 fólkum, og tey fara at fáa eina minniliga uppliving.

Øll ítróttarfólkini ganga í skrúðgongu inn á ítróttarøkið. Special Olympics flaggið fer í húnar hátt, ítróttarfólkini siga fram lyftið, og olympiski eldurin kemur fram eftir longu ferðina.

Tað verður fyrrverandi suðurafrikanski forsetin, Nelson Mandela, sum setir leikirnar.

Undirhaldið verður framúr við eitt nú írska symfoniska orkestrinum, einum 500 manskóri, sum telur 500 mans, Bono og U2 og G5.

Í eldin leygardagin

Longu fyrrapartin 21.juni fara tey fyrstu av okkara ítróttafólkum í gongd við innleiðandi kappingar, og tey vera upptikin av kappingum allara dagarnar frá 21.-29.juni.

Á kvøldi 29. verður endahátíðarhald, har m.a. WestLife fer at spæla, og 30. juni kemur Special Olympics Føroyaliðið heim aftur til Føroya.

Føroyska liðið saman við hjálparfólkunum beint undan fráferðini úr Vágunum mánamorgunin. Ítróttarliðið er mannað við: Meiken Olsen, Marjun Niklasdóttir, John Joensen, Tórur Hjalt Jacobsen, Unn Mortensen, Júst í Túni, Sidana Djurhuus, Elvin Weihe, Durita Strøm og Símun Petur Zachariasen

Mynd: Edvard Joensen

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

ADVOKAT VIRKIÐ

Skúrar til sølu á Tvøroyri

Vegna Tvøroyrar kommunu lýsa vit hermed teir gomlu egningasklúramar eystan fyri Fiskavirking til sølu til hægstbjóðandi.

Nærri upplýsingar fáast frá Tvøroyrar kommunu

Tilboð skulu sendast Advokatvirkinum og skulu vera inni í seinasta lagi 30. juni 2003.

ADVOKATVIRKIÐ
Páll Nielsen Eyðhild Skaalum
Sigmund Poulsen Hans Trygvi Telrin
Skansevegur 1, Postsmoge 85, 110 Tórshavn
Telefon 315171 - Telefax 315874
E-mail: advokatvirkid@advokatvirkid.fo



UTTAN ÚR HEIMI

Staturin skal hava meiri burtur úr oljuni

Danska stjórnin vil nú hava A.P.Møller-Mærsk at rinda meiri fyri oljurættindini í Norðsjónum.

DANMARK
Árni Joensen

Borgarliga stjórnin í Danmark leggur nú trýst á risastóru fyritøkuna A.P.Møller-Mærsk fyri at fáa hana at rinda ríkiskassanum størri part av vinninginum av oljuframleiðsluni í danska partinum av Norðsjónum.

Galdandi sáttmáli millum statin og A.P.Møller er galdandi í tíggju ár afturat, men Bendt Bendtsen, vinnumálaráðharri, sigur, at stjórnin vil hava meiri burtur úr sáttmálanum. Leiðslan í A.P.Møller-Mærsk hevur sagt, at verður avgjaldið til statin hækkað, kann roknast við, at áhugin fyri at leita eftir nýggjum olju- og gassleiðum og at gera nýggjar íløgur í vinnuna verður tilsvarandi minni. Harafturat hevur leiðslan sagt, at hægri avgjald fer at avmarka áhugan hjá felagnum og øðrum feløgum at bjóða upp á tey donsku rættindini, tá verandi sáttmáli fer úr gildi. Men hetta tykist ikki ávirka ráðharran.

A.P.Møller-Mærsk eigur 39 prosent í Dansk Undergrunds Consortium, sum seinastu 41 árini hevur havt rættindini til at vinna olju og gass í danska partinum av Norðsjónum, og hildið verður, at avlopið hesi árini hevur verið slakar 61 milliardir krónur. Serliga tey seinastu árini er avlopið vaksið nógv.

Í februar kravdi ein meiriluti í Fólkatinginum, at stjórnin skal kanna, um tað ber til at útvega ríkiskassanum størri part av olju- og gassvinninginum. Teir báðir stjórnarflokkarnir vóru ímóti avgerðini, men noyddust at gera eftir kravinum frá meirilutanum.

Vinstravongurin í Fólkatinginum sigur, at ríkiskassin skal hava millum tríggjar og tíggju milliardir krónur um árið aftur fyri oljurættindini, og Framburðsflokkurin, sum annars er stuðulsflokkur hjá stjórnini, hevur kravt, at avgjaldið til ríkiskassan skal hækka munandi.

SARS ger minni um seg

Læknar á einum kinesiskum sjúkrahúsi fegnast um, at tann seinasti SARS-sjúklingurin er útskrivaður

Heimsheilsustovnurin WHO hevur tikið fleiri av ávaringunum ímóti SARS aftur.

SARS
Árni Joensen

Í gjár kunngjørdi WHO, at ferðafólk, sum ætla sær til Taiwan, nýtast ikki longur at stúra fyri herviligu lungnasjúkuni SARS, tí smittuvandin har er sera lítil. Fyrradagin kunngjørdi stovnurin, at nú kunnu fólk aftur ekkaleys ferðast til allar landspartar í Kina við undantak av sjálvum høvuðsstaðnum Beijing.

WHO sigur, at smittuvandin er hasaður av í øllum teimum londunum, sum SARS er staðfest í. Fólk, sum fingu sjúkuna, eru vorðin frísk, og tað er langt ímillum, at tað frættist um nýggjar tilburðir.

Heimsheilsustovnurin sigur eisini, at eftirlitið við sjúkuni er bøtt munandi seinastu tíðina.

Skulu skjóta eftir flóttafólkum

Italski ráðharrin í nýskipanarmálum, Umberto Bossi, mælir nú landsins sjóverju til at skjóta við skørpum eftir skipum og bátum, sum koma til Italia við flóttafólkum, sum ætla sær í land uttan at hava neyðug loyvi.

Við blaðið Corriere della Sera sigur ráðharrin, at sjóverjan eigur at skjóta tvey ella trý ávaringarskot fyrst, men er tað ikki nóg mikið til at fáa skip ella bátar til at venda, eiga sjóverjuskipini at nýta kanónirnar. Gera vit ikki tað, sleppa vit ongantíð av við trupulleikan við teimum ólógligu flóttafólkunum, sigur Umberto Bossi við blaðið.

Italskir andstøðupolitikarar og onnur finnast hvassliga at ráðharranum. Tey spyrja millum annað, um ráðharrin er til reiðar at biðja sjóverjuna skjóta eftir kvinnum og børnum. Men tað tykist ikki ávirka Umberto Bossi. Við Corriere della Sera sigur hann, at tey ólógligu flóttafólkini mugu rekast burtur, sama hvørji tey eru.

Flyta fólk úr Sibiria

Tað var tann tíð, tá túsundtals russar vórðu noyddir at flyta eystur til Sibiria, men nú ætla myndugleikarnir í Moskva at gera tað øvugta.

Russland hevur havt stóran búskaparligan vøkstur tey seinastu árini, men tey, sum búgva í teimum fjarskotnu bygdunum og býunum har eysturi í Sibiria, hava fingið lítið burtur úr framburðinum. Har eru nógv tvørturímóti endað í fátækradømi. Hendan trupulleikan ætla myndugleikarnir í Moskva at loysa, og teir hava tí gjørt av at flyta millum 200.000 og 600.000 fólk úr Sibiria til leiðir í Mið- og Suðurrusslandi. Myndugleikarnir hava gjørt greitt, at fólk verða ikki flutt, vilja tey ikki flyta.

Russiska stjórnin hevur sett einar 200 milliónir krónur av til ætlanina, og harafturat hevur Heimsbankin játtað Russlandi 300 milliónir krónur í stuðuli til teirra, sum velja at flyta úr Sibiria.

Stór bílegging

Arabiska flogfelagið Emirates, sum hevur høvuðsstøð í Dubai, hevur bílagt flogfør fyri heilar 120 milliardir krónur frá evropeisku verksmiðjuni Airbus og amerikansku Boeing.

Emirates skal hava 41 flogfør frá Airbus og 26 frá Boeing, og bíleggingin sigst vera ein tann størsta nakrantið í flogsøguni. 21 av Airbus-flogførunum eru av einum nýggjum slagi, sum fer at taka 555 ferðafólk, og sum ætlandi verður sett í flúgving um trý ár. Tað verður heimsins størsta ferðamannaflogfar.

Emirates ætlar, at øll tey 67 flogførini skulu setast í flúgving innan 2010, og tá fer felagið at hava 125 flogfør. Felagið væntar at flyta 30 milliónir ferðafólk í 2010 og ætlar at fara undir fleiri nýggjar rutur.

80 ára gomul og við barn

Tann 80 ára gamla pakistanska kvinnan Kurshid Bibi varð í skundi flutt á sjúkrahús nú ein dagin, tí hon hevði fingið so ilt í búkin. Men á sjúkrahúsainum staðfestu læknarnir, at hon var við barn, skrivar tíðindastovan Anarova.

Læknin Fatima Surraiy, sum eisini er talskvinna hjá Multan-sjúkrahúsinum, sigur við Anarova, at tann 80 ára gamla varð bæði ovfarin og illa við, tá hon fekk boðini frá læknunum. Eitt var, at boðini komu óvart á hana, men uppaftur verri var, at hon visti ikki, hvussu hon skuldi greiða børnunum og ommubørnunum frá, hvussu vorðið var, sigur læknin.

Kurshid Bibi og 85 ára gamli maður hennara, Ahmen Din, giftust í 1950. Árið eftir fingu tey tað fyrsta barnið, so her er langt ímillum tað elsta og tað yngsta.